# TILTØK

**Gudstænastur**
**21. sunnud. e. trinitatis**
*Havnar kirkja:* kl. 11, Jóannis Fonsdal. Kl. 14 Grønlendsk gudstænasta
*Kaldbak:* kl. 12, Bjarni Bæk
Funningur: kl. 12, messa
*Norðskála:* kl. 15, barnagudstænasta, Emil Olsen
*Selatrað:* kl. 12, altarg., Jógvan Fríðriksson
*Bøur:* kl. 11, altarg., David Johannesen
*Kvívík:* kl. 12, Mogens Tilsted Christensen. Í Kollafjarðar kirkju gongur talvan fyri Bláa Kross
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Heri Joensen
*Porkeri:* kl. 12, altarg., Patrick de Neergaard
Øravík: kl. 11, altarg.,
*Fámjin:* kl. 12.15 altarg., Jónsvein Bech. Í Øravík og Fámjin gongur talvan fyri einkjugrunnin
*Haldarsvíkar kirkja:* kl. 12, familjugudstænasta, Uni Næs
*Hvalba:* kl. 17, Ólavur Rasmussen
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, Martin R. Jacobsen
*Norðskála:* kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 messa (minningarhald)
*Eiði:* kl. 15 Barnagudstænasta
*Funningur:* kl. 17, messa (minningarhald) Emil Olsen. Talvan gongur í øllum kirkjum í Eiðis prestagjaldi fyri Einkjugrunnin
*Rituvík:* kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð
*Klaksvíkar Sjúkrahús:* kl. 10,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Niels Pauli Danielsen
*Christianskirkjan:* kl. 11 lestur
*Skopun:* kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen
*Sandavágur:* kl. 11, altarg., Inga Poulsen Dam
*Tjørnuvík:* kl. 12,
*Funningsfjørður:* kl. 16, John Myllhamar

**Alla halganna dag**
**Mánadagur 1. november**
**Minningardagur teirra sjólætnu**
*Gjógv:* kl. 14 minningarhald
*Eiði:* kl. 15.30 Minningarhald, Emil Olsen
*Christianskirkjan:* kl. 20, Bjarni Bæk
*Havnar kirkja:* kl. 20 Elsa Funding
*Tvøroyrar kirkja:* Minningarhald kl. 13.30. Aftaná verður farið út á minnisvarðan, har kransar verða lagdir
*Porkeri:* Minningarhald verður við Minnisvarðan í Porkeri kl. 15.00, Magnus Hansen talar.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Sunnumorgun kl. 10.30 Møti v/ breyðbróting, barnaansing verður eisini.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli í Býlingshúsinum á Norðasta Horni og sunnukvøldið kl. 18 Møti í Missiónshúsinum.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 12 verður eisini møti, har Páll Poulsen talar úr Opinberingini kap. 4. »Afturkoma Jesusar í luftini – trúgvandi verða burturrykt«.
Mánakvøldið kl. 19 verður Ungdómstiltak fyri ung í aldrinum 5.-10. flokk.
www.hebron.fo

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Petur F. Johannesen, Skála.

**Lívdin**
**í Hoyvíkar skúla**
Leygardagin kl. 13.30 til 17 verður skeið fyri samkomuleiðarar og onnur ábyrgdarfólk í samkomuni, undirvísari verður Tony Sargent. Evnið verður »Týdningurin av bønarlívinum í samkomum okkara«. Ungdómsmøti kl. 20.30 har Tony Sargent talar. Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti har Tony Sargent talar um evnið »Krossurin« og á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar Jógvan Z. um reformatorin Martin Luther. Barnaansing fyri børn undir skúlaaldur verður á báðum møtunum. Sunnudagsskúlin verður kl. 12 og tá er síðsta freist at lata skógvaeskjunar til Christmas Child inn. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ Tummas Juul Askham, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bøn.

**Meinigheitshúsið**
Leygardagin kl. 9.30-12 Foreldur og børn.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Gunnar Reynslág, Miktam syngur.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Finn Arvé prestur í Mariukirkjuni.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15 til 18. Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar.
Sunnudagsskúli kl. 14.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin 1. nov. kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Sverra Steinhólm presti.
Evnið: Allahalganna.
Týsdagin: Várgleði fyri børn.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Familjumøti, innsavnan av gávueskjum, kl. 18 Valkvøld, umboðan úr øllum flokkum.
Mánadagin kl. 20 Felags bønarmøti í Evangeliihúsinum við Meinigheitini í Hoyvík.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. Telefonin svarar man-frí frá 8-16.
www.filadelfia.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 Møti.
Familjutími har »Barnaróddir« stíla fyri.
Mánadagin kl. 17 og 19 Skótamøtir.
Hósdagin 4. november skipar Heimaforbundið fyri Árasølu.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Frá Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, talari: Tony Sargent, leiðari á ICC bíbliuskúlanum í Glaskow.
Mánadagin kl. 17 Kvinnur koma saman til bøn í Sloans húsi. Øll eru vælkomin.

**Dunamis Bíbliuskúlin**
Leygardagin 30. okt. skipar Dunamis Bíbliuskúlin fyri einum bíbliuskúladegi í Filadelfia í Havn. Byrjað verður kl. 10 og endað verður kl. 15.00. Evnið er Guds samkoma og samfelagið. Ikki er neyðugt at melda seg til bíbliuskeiðið. Kostnaður 150 kr. Øll eru vælkomin.

**Vestmanna Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli og kl. 19 Møti við Hanus Lassen úr Klaksvík.

**Saron, Vestmanna**
Evangel. møti verður sunnudagin kl. 18.
Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti. Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

**Missiónsvika í Funningi**
**28. til 31. okt. 2004**
Leygardagin kl. 17 Barnamøti v/ Jógvan Højgaard, kl. 20 talar Marius Jacobsen, Jónhilda og Gulak syngja.
Sunnudagin kl. 15 Sunnudagsskúli v/ Kristionnu Johannesen, kl. 18 Niels Jacob Nielsen talar, Leila Højgaard syngur. Innsavnan til Heimamissiónina.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 20 Konsert við I am og Narnia.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Paula Høj, Lisa Frederiksberg syngur. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti. Verið hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Gøtu**
Møti verður í kirkjukjallaranum sunnukvøldið kl. 18. Margeir Toftegaard úr Fuglafirði talar.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20. JógvanFríðriksson hevur um evnið samskifti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli. Í sambandi við fløskuinnsaml. verður drekka aftaná fyri børnum og vaksnum. Barnakórið byrjar venjingina aftur aftaná. Øll børn eru vælkomin at syngja við. Kl. 19 Møti við Torstein Jóhannesen. Innsamling til HM.

**Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14.30 Familjumøti. Ung sum vitjaðu Ukraini luttaka. Barnakórið syngur. Greitt verður frá fløskuinnsavningini. Aftaná verður høvi at fáa ein drekkamunn. Sangmøti kl. 18 við luttøku úr Sandoynni. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gøta**
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20, øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- & lovsangsløta, kl. 18 Møti v/ Jacob Hendrik Hansen.
Innsavnan.
Mánadagin kl. 17 Barnaarbeiði 1.-6. flokk.
kl. 19 Ungdómsarbeiði 7. fl. og eldri. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betesda, Norðoyggjar**
Sunnudagin kl. 11 Minnismáltíð Harrans,
kl. 12.30 Sunnudagsskúli,
kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadag kl. 20 Bønarfundur.
Mikudag kl. 20 Uppbyggingarfundur.
Hósdag kl. 21 Ungdómsfundur.
Sunnukvøldið 31.10. kl. 18 greiða Jørundur Hansen og Símun Ósá, trúboðari frá arbeiðinum í Suður-Grønlandi.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 1. januar 2005 kl. 15.00 giftast í Evangeliihúsinum í Tórshavn, Annika Jørgensen, Sørvágur og Magni Reinert, Tórshavn. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Miðvági kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma til teirra stóra dag, verða biðin um at tekna seg á tlf. 212480, 216185 ella 220145 áðrenn 5. desember.

Leygardagin 20. november kl. 16.00 giftast í Vitninum í Hvalba Gunna Dimon og Jón við Neyst, bæði úr Hvalba. Veitslan verður á Hotel Øravík kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu, verða biðin um at ringja á tlf. 375189 ella 580168 áðrenn 30. oktober.

Leygardagin 20. november kl. 13.00 giftast í Betesda í Klaksvík, Amalia Hansen, Klaksvík og Ólavur M. Lamhauge, Søldarfjørður. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu, verða biðin um at ringja á tlf. 456728 ella 441168, áðrenn 10. nov. 2004.

2. juli í 2005 giftast í Noreg, Tone Blindheim, Bartavik, Noreg og Johnny Willumsen, Hvalba. Tit, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, vinarliga sigið okkum frá sum skjótast og helst áðrenn 15. november, so vit kunnu útvega bústað til brúdleypsgestirnar. Sigið frá á tlf. 375239 ella 251984.

## 90 ÁR

Týsdagin 2. november verður Alice Joensen, Jansstovugøta 16, Tórshavn 90 ár. Hon verður at hitta í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J. H. Schrøtersgøta 9, millum kl. 11.00 og 15.00.

## SILVURBRÚDLEYP

24. november hava hjúnini Kristina og Andras Nybo, Hósvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Hósvík leygarkvøldið 20. november kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í silvurbrúdleyp, kunnu tekna seg á tlf. 422435 ella 214416 til og við 7. november.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»Hesa byrjan av teknum sínum gjørdi Jesus í Kána í Galileu og opinberaði dýrd sína, og lærusveinar hansara trúðu á hann«*
*(Jóh. 2,v. 11)*

Gamalt er í søgu kirkjunnar, at av ápostlum Jesusar skuldi Jóhannes ápostul og ev. gerast hin elsti og doyggja sum fleiri og níti ára gamal í Efesus í Lítla-Asiu, eftir at hann hevði skrivað okkum bæði evangeliið sum ta opinbering, ið gongur undir hansara navni.

Her sat hann langt av leið heimani og mintist aftur á tíðina saman viðJesusi og hinum lærusveinunum; hann hevði sæð og upplivað so mangt, verið fyri atsóknum og forfylgingum, ið høvdu kostað bæði Jesusi sum mongum av hinum lærusveinunum lívið. Men so kann sami lærusveinur ikki gloyma, at hann eisini hevur upplivað bæði páskir sum hvítusunnu – hevði sjálvur verið við í Jerúsalem og ásannað, hvussu Jesus var ikki deyður, men framvegis var har allar staðir, har tey savnaðust í navni hansara – hvussu Jesus var har í kristnu guðstænastuni og enn sum áður gjørdi vart við seg, gav lívstekin síni frá sær, lat frætta frá sær, bæði tá ið orðið var boðað – ella tá hann í dópinum gjørdi okkum til børn og medarvingar sínar ella tá ið hann við altarborðið gjørdi okkum eitt við seg í breyðinum og víninum, at nú alt okkara skuldi verða hansara sum alt hansara okkara, eisini sigur hansara langa fríggjadag á synd og deyða. Sermerkt er fyri Jóhannes evangelist, at tá hann skal skriva okkum evangeliið – søguna um Jesus Krist kann hann bara skriva hesa søgu eins og søgu, hann ongantíð verður liðugur at skriva – eins og vit ikki kunnu skriva eftirmæli teirra, ið framvegis eru uppi á døgum og eru livandi og virkin enn sum áður. Soleiðis sær Jóhannes søgu Jesusar sum ta somu søgu, vit fylkjast um, hvørja ferð guðstænasta er – sum vil evangelisturin minna okkum á: Eg kann ikki skriva søguna um jesus lidna, tí hon er ikki liðug, henda sama søga skal halda fram allar staðir um allan heim, har tit savnast í Jesu navni og har tit eftir boðum hansara doypa til hansara navn og fara til borðs saman við honum. Har skulu tit allar dagar ásanna, hví eg ikki kann skriva søgu hansara lidna ella øðrvísi enn eg havi skrivað.

Hetta man hava gjørt sítt, at evangelisturin umrøður undurverk Jesusar sum »tekin« – t.e. at hesi undur eiga ikki at standa har einsamøll, men eru at skilja eins og lívstekin frá hinum upprisna Jesusi eisini til okkara í dag – sum til øll kristin menniskju allar tíðir.

**Martin Restorff Jacobsen, á Nesi**



# TILTØK

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

**KFUM & K, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Konfirmantaveitsla, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 15 Familjumøti við drekkamunni aftaná. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Viðareiði**
Møti verður í Missiónshúsinum sunnukvøldið kl. 18 við Jóhan Henriksen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Tom og Kára. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin í Vági**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Evangel. møti. Streingjakórið syngur, Eyðun Christiansen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Bygdarhúsið í Porkeri**
Sunnukvøldið kl. 20 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Sumba**
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Jacob Poulsen og Ebbu Midjord. Nimrod og Ebba syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Esbjerg**
Føroyskt møti verður í Zions kirke sognehus í Esbjerg leygarkvøldið 30.10.04 kl. 19.30 v/ Hildubjartur Højgaard sum talar og syngur. Eftir møti verður kaffi. Øll hjartaliga vælkomin.

**Ísraelsfelagið**
Sunnudagin 31. okt. kl. 14.30 heldur Jørn Nilsen úr Danmark almennan fyrilestur um evnið: »Ísrael og viðurskiftini í miðeystri í dag«.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 1. november*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-17 Vit hugsa um jólini
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl, dart og onnur spøl. Møguleiki er at koma sum gestur til døgurðan miku- og fríggjadagin. Tilm. tlf. 316491
*Týsdagin 2. november*
kl. 10.00–11.30: Vit syngja. Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15.00: **Frálæra í nýtslu av gongustavum**, Marita Tórsheim, fysioterapeutur
*Mikudagin 3. november*
kl. 10.00–13.00: Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði
kl. 15.00-17.00 **Ágrýtin og gamal. Orðaskiftið við komandi býráðspolitikarar undir heitinum: »Vegamót har árini hittast«**
kl. 17.00–21.00: Opið hús
*Hósdagin 4. november*
kl. 10.00–10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00–11.45: Eingilskt taluprát, Ásmundur Johannesen
kl. 14.00–17.00: Telduprát
kl. 14.00–16.00: Boccia í kjallaranum
*Fríggjadagin 5. november*
kl. 10.00–13.30: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði
kl. 13.00–17.00: Opið hús.

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *ólíkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl. 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðini eru eisini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Mánadagin 1. november*
Vit lurta eftir seinasta brotinum av »Fram við landi« við Dánjal í Klingruni.

**Dagtilhaldið Fløvi**
– í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
*Mánadagin 1. november*
Alla halgannadag er stongt
*Týsdagin 2. november:*
Hugnaløta við burturluting.
*Mikudagin 3. november:*
Vit fáa vitjan av lokalum valevnum til kommunuvali
*Hósdagin 4. november:*
Myndaveving fyri áhugað v/ Rannvu Gøte.
*Fríggjadagin 5. november:*
OPIÐ HÚS.

*Hvønn dag ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Ørkin í Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøldið kl. 20.30.
Leygarkvøldið 6. nov.: Hugnakvøld v/ Bjarna Bæk, dómprósti.
Sunnudagin 7. nov. kl. 15.00: Gudstænasta í Háteigskirkju v/ Bjarna Bæk, dómprósti. Aftaná verður kaffi á Ørkini.

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Eliaskirkjan**
Møti er hvørt leygarkvøldið kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Sunnudagsskúli er í Eliaskirkjuni hvønn sunnudag kl. 14 í kjallaranum og kl. 11 í barnarúminum á Oyrasundskollegiinum, Dalslandsgade 8 á Amager. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32969995 ella Róa Rasmussen tlf. 32886480. E-mail: ek_fo@get2net.dk

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll oman fyri 60 ár eru vælkomin.
Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.:
fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr.
Ringið: Ella 316261, Tone 261165, Hans Jákup 778170, Guðrið 314607. Arni 222552

**Lymfødemfelagið**
*Box 2113, FO 165 Argir*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Heilafelagið**
Íslandsvegur 10 · tlf. 317373
T-post: heilaf@post.olivant.fo
Nærri upplýsingar, eisini við ráðgeving, finst á heimasíðuni: www.mbf.fo undir »Um MBF«.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

**Føroyskir Mærsk Siglarar**
*Grønlandsvegur 58, 100 Tórshavn*
Frítíðarfelag, hvørs endamál er at røkja áhugamál hjá teimum føroyingum, ið starvast hjá A. P. Møller – Mærsk A/S. Tilmeldingarskjal fæst við at venda sær til felagið á tlf. 590100 ella um teldupost: aldebaran@kallnet.fo

**Javni**
*Hoydalsvegur 40 · 3 hædd*
Vit hava eisini eina heimasíðu: www.javni.fo og t-post adressu: javni@post.olivant.fo har tit altíð eru vælkomin at senda spurningar ella viðmerkingar.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Føroya Astma/ Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: hvønn hósdag kl. 16.30-18.

**Deyvafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10B*
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 317597,
fartlf. 222381,
skrivitlf. 316929 · fax 313609 og teldupostadr. deaf@deaf.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**Felagið fyri Hoyribrek í Føroyum**
Felagið, telur í løtuni uml. 350 limir. Fyri at gera sambandið millum limirnar og felagið lættari, heitir nevndin á limir sínar um at senda E-mail adressuna til onkran í nevndini.
Samband fæst við felagið soleiðis:
Solveig 313484 - 219584
E-mail: solveig@kallnet.fo
Katrin 313320
E-mail: finkat@kallnet.fo
Jórun 422326.
E-mail: terjo@post.olivant.fo
Felagið hevur:
E-mail adressuna:
hoyr@post.olivant.fo
Postboks 1276, FO-110 Tórshavn
Ella J. C. Svabosgøta 17, FO-100 Tórshavn

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
*Postadr.: MBF-Húsið*
*Íslandsvegur 10c*
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Opið er týs- og hósdag frá kl. 13.00-16.00.
Tlf. 310237. www.gikt.fo
T-postur: gikt@gikt.fo

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
*Grønlandsvegur 58, Tórshavn*
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
*Íslandsvegur 10c*
*FO-100 Tórshavn · tlf. 317373*


**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**



Leygardagin 30.10. kl. $20^{30}$
Leygardagin 30.10. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 31.10. kl. $19^{30}$
Sunnudagin 31.10. kl. $22^{00}$



**Skúlasýningar verða fyriskipaðar**
Leygardagin 30.10. kl. $19^{45}$
Sunnudagin 31.10. kl. $19^{00}$



Leygardagin 30.10. kl. $22^{30}$
Sunnudagin 31.10. kl. $21^{30}$



Leygardagin 30.10. kl. $18^{30}$
Sunnudagin 31.10. kl. $17^{30}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**